

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 02 - 2012

# Oljunorra - 2011 royndist ómetaliga væl

2011 gjørdist nógv meiri hendingaríkt enn tey annars høvdu droymt um í norska olju- og gassídnaðinum. Tað ger ársfrágreiðingin hjá Oljeindustriens Landsforening, sum er systurfelag hjá Føroya Oljuídnaðarbólki, greitt. Í frágreiðingini hugleiðir Gro Brækken, stjóri í Oljeindustriens Landsforening, um tey, sum spáddu, at tíðin var farin frá stóru oljufundunum í Noreg. Stóra fundið á norska landgrunninum, Ormurin Langi, í 1997 tóktist vera langt burtur, vísir Brækken millum annað á. Men í 2011 vóru hesir spádómar og døpru útlitini gjørd til skammar. Fyrst komu tíðindini um Skrugard-fundið. Síðani vóru vit beinrakin á Norvarg. Johan Sverdrup taldist eisini millum heimsins størstu fund í 2011, greiðir Brækken frá. Hon nevnir eisini bjørtu útlitini fyri petroleumsídnaðin, ið somuleiðis talar fyri, at 2011 royndist væl. Vit hava gjørt fleiri týdningarmikil fund og virksemi á landgrunninum er stórt. Men vit vita eisini, at oljuframleiðslan er fallin við 40 prosentum seinastu tíggju árini. Stevnumiðini, stjórnin hevur sett út í kortið, eru treytað av miðvísari leiting í økjum, sum eru búgvin til tess, at vit vinna meiri burtur úr verandi økjum og at vit sleppa fram at nýggum leitiøkjum. Samstundis skal petroleumsframleiðslan framhaldandi virka við óvíkiligum fokus á trygd og umhvørvi. Hetta er tvey øki, sum framyvir koma at krevja ein áhaldandi innsats, sigur Brækken, stjóri í Oljeindustriens Landsforening, millum annað í ársfrágreiðingini.